# Henda ikki munandi broytingar fer rækjuskipaflotin av knóranum



*Nøkur skip hava tó klárað seg frægari enn onnur, men sum heild, skinklar botnurin undir øllum okkara rækjuskipaflota*

## Rækjuvinna

### Rakstur 1998 – 2002

| | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | Vøkstur 4 ár | Vøkstur 1 ár |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 7 | 8 | 8 | 8 | 6 | | |
| Nettosøla | 213.373 | 242.177 | 201.600 | 254.055 | 154.272 | -27,7% | -39,3% |
| Broyting í goymslu liðugvøra | 8.242 | -9.612 | 8.752 | -1.487 | 2.741 | -66,7% | -284,3% |
| Aðrar inntøkur | 3.484 | 1.634 | 2.462 | 14.793 | 8.061 | 131,4% | -45,5% |
| Annar kostnaður | -111.353 | -116.056 | -119.500 | -177.804 | -102.031 | -8,4% | -42,6% |
| **Bruttovinningur** | **113.747** | **118.143** | **93.314** | **89.557** | **63.043** | ***-44,6%*** | ***-29,6%*** |
| Starvsfólkakostnaður | -75.660 | -80.443 | -75.407 | -78.118 | -54.400 | -28,1% | -30,4% |
| Niðurskriving av umferðarfæ | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Avskrivingar | -18.123 | -19.291 | -24.079 | -32.043 | -26.799 | 47,9% | -16,4% |
| Niðurskr. av egnum partabr. | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Afturførdar niðurskrivingar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| **Úrslit av primerum rakstri** | **19.964** | **18.409** | **-6.172** | **-20.604** | **-18.156** | ***-190,9%*** | ***-11,9%*** |
| Úrslit atknýtt felag | 0 | 1.773 | -513 | 1.046 | 0 | - | -100,0% |
| Niðurskr. av partabrøvum | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Rentuinntøkur | 640 | 690 | 5.861 | 8.269 | 2.089 | 226,4% | -74,7% |
| Rentuútreiðslur | -15.612 | -16.278 | -13.931 | -18.087 | -15.202 | -2,6% | -16,0% |
| **Úrslit áðrenn óvanligt** | **4.992** | **4.594** | **-14.755** | **-29.376** | **-31.269** | ***-726,4%*** | ***6,4%*** |
| Íløgustuðul | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Óvanligar inntøkur | 3.119 | 42.487 | 7.294 | 16.976 | 6.112 | 96,0% | -64,0% |
| Óvanligar útreiðslur | 0 | -4.461 | 0 | -38 | 0 | - | - |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **8.111** | **42.620** | **-7.461** | **-12.438** | **-25.157** | ***-410,2%*** | ***102,3%*** |
| Skattur av ársúrsliti | -481 | -5.985 | 1.508 | 2.362 | 3.573 | -842,8% | 51,3% |
| **Ársúrslit** | **7.630** | **36.635** | **-5.953** | **-10.076** | **-21.584** | ***-382,9%*** | ***114,2%*** |
| Vinningsbýti | 800 | 3.220 | 0 | 0 | 0 | -100,0% | - |
| Tons íalt | 13.224 | 14.277 | 10.904 | 17.254 | 11.869 | -10,2% | -31,2% |
| Miðalprísur | 16,14 | 16,96 | 18,49 | 14,72 | 13,00 | -19,4% | -11,7% |
| Dagar á fiskileið (mynstring) | 2.461 | 2.315 | 1.528 | 2.754 | 1.844 | -25,1% | -33,0% |
| Søla pr. dag (tkr.) | 87 | 105 | 132 | 92 | 84 | -3,5% | -9,3% |
| Ársverk | - | - | - | 225 | 175 | - | -22,2% |

*Henda talvan, sum grannskoðarafyritøkan, Rasmussen & Weihe hevur gjørt, lýsir raksturin hjá rækjuskipaflotanum, árini 1998-2002*




*Tað var Jóhan Martin Jacobsen, sum vegna Rasmussen & Weihe legði roknskapargreiningina av vinnuni fram*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Rækjuskip, niðurstøða**

- Øll 5 árini hava verið vánalig – hall seinastu 3 árini
- Støðan er álvarslig
- 2003 ?: Roknast má við, at fleiri skip fara

*Niðurstøðan hjá Rasmussen & Weihe er greið: Rækjuskipaflotin hevur hall, støðan er álvarslig, og roknast má við, at fleiri skip fara av knóranum*

**– Hóast eina bókaða eginogn uppá stívliga 138 miljónir krónur í 2002, er álvarsamur vandi fyri, at rækjuskipaflotin ikki megnar at yvirliva, sigur Rasmussen & Weihe í roknskapargreining, sum grannskoðarafyritøkan hevur gjørt**

RÆKJUSKIPAFLOTIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í roknskapargreiningini av fiskiskipaflotanum, árini 1998-2002, sum í fyrsta lagi byggir á almennu roknskapirnar hjá avvarðandi feløgum, sigur grannskoðarafyritøkan, Rasmussen & Weihe, at øll hesi fimm árini hava verið vánalig hjá rækjuskipaflotanum.

### Fallandi prísir

- Í 1999 "bjargaðu" óvanligar inntøkur úrslitinum, men seinastu trý árini hevur raksturin víst hall, sum er tvífaldað á hvørjum ári.

Víst verður á, at miðalprísurin fyri rækjur hevur verið støðugt fallandi seinastu trý árini.

Í 2000 var miðalprísurin 18,49 krónur fyri kilo; í 2001 14,72 og í 2002 bert 13 krónur fyri kilo.

Ársverkini í rækjuskipaflotanum vóru 225 í tali í 2001 og 50 færri í 2002. Hyggja vit at fiskidøgunum hesi bæði árini, sæst, at hesir í 2002 vóru 1.844 í tali og heilir 2.754 í 2001.

Samlaða tonsatalið í 2001 var 17.254 ímóti 11.869 tonsum í 2002.

Miðalaldurin á rækjuskipunum er 13 ár, og er hetta sostatt yngsti skipabólkur í flotanum.

### Aðrar inntøkur

Í talvuni yvir "aktiv", sæst, at stórar íløgur eru gjørdar í skipini í 2000, og somuleiðis eru kapitalpartarnir við meira, sum tað eitur í greiningini, nógv øktir í 2002. Hesin postur er lutfalsliga stórur.

Í talvuni yvir "passiv" sæst, at eginognin hjá rækjuskipunum er økt hesi 5 árini (1998-2002), hóast raksturin vísti stórt hall. Orsøkin er partvís, at tvey skip, ið høvdu negativa eginogn, ikki eru við í tølunum fyri 2002, tá ið tey fóru á húsagang. Somuleiðis eru uppskrivingar av kapitalpørtum førdar yvir eginognina í 2002.

Greiningin vísir, at okkurt av feløgunum hevur stóra eginogn, ið stendst av stórum inntøkum frá dóttirfeløgum. Hetta er við til at halda eginpeniginum hjá rækjuflotanum uppi.

Jóhan Martin Jacobsen, sum legði roknskapargreiningina fram, vísti á, at rækjuskip eru virðisásett til útveganarvirði við frádrátti av av-og niðurskrivingum – og ikki til handilsvirði.

- Tað er ivasamt, hvørt handilsvirðið svarar til bókaða virði.

Rasmussen & Weihe metir tí í greiningini, at bókaða eginognin hjá rækjuskipunum er hægri enn veruliga ognin.

- Hóast eina bókaða eginogn uppá stívliga 138 miljónir krónur í 2002, sum er hin størsta hesi 5 árini, er álvarsamur vandi fyri, at rækjuflotin ikki megnar at yvirliva.



*Rækjuskipareiðarar vóru eisini við til framløguna um fiskiskipaflotan*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Av knóranum

Skuldin hjá rækjuflotanum øktist munandi árini 1998 til 2000, tá ið hon var 406,8 miljónir krónur. Síðan er hon minkað nakað aftur, og var við árslok 2002 332 miljónir krónur.

Sambært talvunum, var talið av rækjuskipum í greiningini 7 (1998), 8 (1999), 8 (2000), 8 (2001) og 6 í 2002.

Jóhan Martin Jacobsen vísti á, at ognaravkastið, sum er úrslitið av primera rakstrinum og aktivum tilsamans, er vánaligt fyri rækjuskipini. Tað sama er galdandi fyri rentingina av eginognini. Soliditeturin er ikki serliga góður, tó at hann er øktur. Aftrat hesum eru, sum tað eitur á fakmáli, gjaldførislyklatølini fallin ógvusliga nógv seinastu fýra árini.

Niðurstøðan í greiningini av rækjuskipaflotanum er, at flotin hevur havt nøkur trupul ár, og støðan er alt annað enn góð við árslok 2002.

- Tað er eisini alt, sum bendir á, at rækjuvinnan hevði eitt vánaligt ár í 2003. Okkurt skip er farið av knóranum, og okkurt er farið úr flotanum. Henda ikki munandi broytingar í rakstrinum, má roknast við, at fleiri skip fara av knóranum í næstum, segði Jóhan Martin Jacobsen, sum starvast hjá grannskoðarafyritøkuni, Rasmussen & Weihe.

Rækjuskipini, sum eru við í greiningini, eru South Island, Sólborg, Napoleon, Høgifossur, Arctic Viking, Hvilvtenni, Atlantic/ Kappin og Borgin.